







# Hvussu nógv pláss vilt tú hava?

Her eru møguleikar fyri at liva, virka og trívast, og her kanst tú breiða teg út uttan ampa fyri nakran.

**Fyrsta fatanin**
Tú sært við tað sama, at her er talan um eini stór og stásilig hús í serflokki. Húsini eru væl bygd og løtt at halda. Vindeyguni eru úr plast og skjøldrarnir eru klæddir við aluminium. Alt er sera væl hildið, og tú fært eina fatan av, at talan er um eini vala hús.

**Ljós og luft – inni og úti**
Tá ið tú koyrir oman í Fútalág og koyrir inn í blindu gøtuna, kemur tú inn í eitt trygt umhvørvi við góðum parkeringsviðurskiftum, og tá ið tú kemur niðan til húsini, verður opið til ljós, luft og hav. Urtagarðurin er trivaligur, og fleiri góðir sólkrókar eru til løturnar við sól. Trappan og sólkrókurin eru løgd við føroyskum brotflísum. Vindeyguni eru stór, so tú fært alt sólarljósið inn og húsini standa so nær við havið, at tú fært hetta serliga ljósið, ið bert havið kann geva. Stovan og terassan eru so nær hvørjum øðrum, so lítil munur er at vera inni og úti, tá ið veðrið er til vildar. Terassan er stór og góð, tú kanst ganga beint út úr stovuni og útsýnið er frálíkt.

**Stílur og snið**
Stílurin er lættur og ljósur, men hevur eisini ein serstakan dám av tyngd og dygd. Húsini eru ikki nýggj, men alt er væl hildið og í sera góðum standi. Húsini eru so við og við dagførd og viðlíkahildin, so tey eru so góð sum nýggj.

**Kjallarin**
Inngongdin er í niðastu hædd og er snøgg at koma inn í, men møguleiki er fyri at ganga beint inn í eitt frálíkt kjallarúm, har tú kanst takast við mangt og hvat. Ketilin og oljufýrið er nýtt og hartil er eitt fitt goymslurúm.

**Bilhús**
Bilhúsið, sum er niðanfyri húsini, hevur pláss til ein bil, men annars er væl av plássi fyri fleiri bilum uttanfyri.

**Uttan fyri og uttanum**
Urtagarðurin er hugnaligur og væl røktur. Uttan um er stórt friðað øki, og urtagarðurin og økið uttanum er sum ein heild. Har er vakurt og friðarligt, og tað einasta, ið tú hoyrir, er fuglaljóð og seyð, ið jarmar – hetta hóast tú so at siga ert mitt í býnum.

**Innrætting**
Í miðhæddini er trappugongd / hall, stova við útgongd til stóra terassu, borðstova / køkur, grovkøkur, bryggers / nvaskirúm, skapsrúm, hjallur við útgongd til snóratræ, millumgongd, baðirúm og hjúnarrúm. Í ovastu hædd er trappupallur, stova / alrúm, hjúnarrúm, 2 kømur, baðirúm. Í niðastu hædd er inngongd, gongd / trappa / hall, fýrrúm / kjallararúm við egnari inngongd og goymslurúm.

**Fakta**
Fútalág 36, Tórshavn
Byggiár: 1971
Hæddir: 3
Gólvvídd: 250 fermetrar
Grundøki: 586 fermetrar
Hjallur: 5 fermetrar
Bilhús: 30 fermetrar

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni